

www.oljan.fo

**Jan Müller** 30 - 11 - 2011

# Cairn steðgar á í Grønlandi

Skotska oljufelagið Cairn Energy boðar nú frá, at felagið steðgar á við oljuleitingini í Vesturgrønlandi. Felagið hevur leitað nú í tvey ár uttan úrslit, og nú er so avgjørt, at eingin boring verður í 2012. Tað er tó ikki óhugsandi, at felagið fer at gera seismiskar kanningar næsta ár. Tey bæði seinastu árini hevur Cairn borað átta brunnar, men allir hava verið turrir. Leitingin hevur kostað felagnum góðar fimm milliardir krónur. Simon Thomson, sum er forstjóri í Cairn Energy, sigur í einum tíðindaskrivi, at felagið hevur framvegis vónir um at finna olju við Vesturgrønland, tí boringarnar hava hóast alt avdúkað tekin um olju og gass. Í grønlendska landsstýrinum vóna tey sum vera man, at Cairn Energy fer at finna olju. -Vit vóru ikki sørt bjartskygd eftir boðini, sum komu herfyri. Tíverri hevur felagið ikki funnið gass ella olju enn, men tekinini um, at kolvetni er har, boða frá góðum, sigur landsstýrismaðurin í ráevnismálum, Ove Karl Berthelsen, við Politiken. Hann setir sítt álit á, at skotska felagið fer at halda fram við sínum leitivirksemi komandi árini og somuleiðis, at onnur feløg, sum hava fingið leitilovyi har, fara at halda fram við sínum verkætlanum. Fleiri av heimsins størstu oljufeløgum hava leitiloyvi í Grønlandi. Amerikanski jarðfrøðiligi granskingarstovnurin hevur annars mett, at tað finnast stórar nøgdir av olju og gassi í øllum tí arktiska økinum, íroknað Grønlandi.